ítróttur

Nr. 6 • fríggjadagur • 10. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Ingi er bjartskygdur

Liðformaðurin á føroyska liðnum, Ingi Olsen, trýr uppá eitt gott úrslit móti Ísrael, hóast vánaliga avrikið móti Finnlandi. Enn hevur hann einki mál skotið, og tað skal helst ikki henda aftur hesuferð

MYND: Álvur Haraldsen

Í dag skal føroyska hondbóltslandsliðið royna seg móti Ísrael, og liðformaðurin Ingi Olsen er bjartskygdur og trýr uppá eitt gott úrslit, hóast liðið fekk ein ordiligan framman móti Finnlandi sunnudagin

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

– Eg eri bjartskygdur undan dystinum móti Ísrael í dag, og eg trúgvi framvegis, at vit kunnu fáa eitt gott úrslit móti ísraelum, sigur Ingi Olsen, liðformaður á føroyska hondbóltslandsliðnum.

Hann varðveitir vónina um eitt gott úrslit, hóast føroysku leikararnir fingu ein dyggan undir vangan, tá teir máttu lúta heili 31-15 móti Finnalndi.

– Vit klárað ikki at halda høvdið kalt í dystinum móti Finnlandi. Eftir ta góðu byrjanina, herjaðu vit á ístaðinfyri at draga ferðina úr dystinum, sigur VÍF leikarin Ingi Olsen, sum heldur, at finnar høvdu analyserað tann fyrra dystin betur enn føroyingar, og teir høvdu tí funnið fram til veikleikarnar á føroyska liðnum.

Hann vísir eisini á, at føroysku leikararnir als ikki fylgdu uppleggínum hjá venjaranum, og hetta vórðu teir revsaðir fyri. Eftir dystin vóru leikararnir sera vónbrotnir, men teir eru uppsettir uppá at betra um avrikið, nú Ísrael er mótstøðuliðið.

Ísraelar eru væl fyri

Ingi Olsen kennir ikki so nógv til ísraelska liðið, men hann og leikararnir hava sæð ein dyst, sum Ísrael spældi móti Danmark. Ísraelar taptu við heilt fáum málum.

– Ísraelska liðið spælir sera skjótt frameftir vøllinum, og teir royna at avslutta beinanvegin. Vanliga dekka teir sera offensivt, og leikararnir eru høgir. So vit fáa okkum veruliga royndar, sigur Ingi um ísraelar.

Ingi Olsen vísir á, at ísraelar kanska fara at undirmeta Føroyar, og hetta kann gerast ein fyrimunur fyri okkum.

Spurdur um hvat skal til fyri at føroyingar kunnu fáa eitt gott úrslit móti Ísrael, svarar hann, at tað er alneyðugt, at allir leikararnir hava ein góðan dag, og at allir berjast sum úlvur á skóg fyri hvørjum øðrum.

Hann ávarar tó ímóti at hava ov høgar vónir, tí teir flestu leikararnir hava lítlar og ongar royndir í altjóða hondbólti. Tað er eisini ein sannroynd, at Ísrael hevur eitt betri lið enn Føroyar.

Einki mál fingið enn

Persónliga hevur tað ikki gingið serliga væl hjá føroyska liðformanninum. Ingi hevur enn einki mál fingið í teimum báðum dystunum móti Finnlandi.

Ingi Olsen hevur verið ein av leikarunum, sum oftast hevur gingið á odda í málskjótingini og hevur tikið åbyrgd inni á vøllinum. Hetta hevur ikki eydnast hesuferð, og tað nívir sjálvsagt tann garvaða vestmenningin.

– Eg havi ofta skotið nógv mál, men tað hevur als ikki gingið hesuferð, og tað eri eg vónbrotin um, sigur hann. Ingi hevur tó ikki havt meira enn eini sjey royndir uppá mál í báðum dystunum móti Finnlandi.

Hann vísir á, at finnar trýstu spælið inn á miðjuna, og at verjan gjørdist sera tøtt av tí sama. Hetta darvaði honum nógv í spælinum, og hann hevði ilt við at spæla bakkarnar upp. Finnland spældi við eini 5-1 verju, og tann eini maðurin datt næstan heilt niðan á Inga, sum at kalla bleiv mansvardur.

– Vit fingu onga breidd í spælið, og vit brúktu ikki vøllin nóg væl, vísir hann á.

Ingi Olsen er keddur av, at ein maður sum Áki Mørk ikki kann vera við, tí tað hevði ligið væl fyri hjá Áka at loyst Inga av, tá tað ikki gongur eftir vild á vøllinum.

Mugu reisa seg

– Tað er sera umráðandi, at vit reisa okkum eftir seinasta dystin, og vit trúgva uppá eitt gott úrslit. Tað skal tó ikki misskiljast soleiðis, at vit halda okkum vera betri enn Ísrael, men tað ber til, sigur Ingi Olsen.

Hann sigur viðari, at leikararnir sera fegnir vilja geva áskoðarunum eina betri uppliving enn seinast, tá eingin spenningur var í dystinum. Hann vísir tó á, at Finnland spældi sera væl, og at teir vóru meira enn væl nøgdir við sítt avrik.

Føroyska landsliðið vandi fyri seinastu ferð mikukvøldið í Vestmanna, og hóskvøldið høvdu leikararnir frí. Í dag, fríggjadagin, klokkan hálvgum átta møtir føroyska liðið so Ísrael í høllini í Vestmanna.

Finnland basti Belgia

Finnland hevur fult stigatal í bólki 3, eftir at liðið vann 25-20 á útivølli móti Belgia

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Tá avtornaði vóru fimm mál á muni millum Belgia og Finnland, tá liðini møttust í belgiska býnum Beyne-Heusay mikukvøldið. Finnland vann 25-20, eftir at Finnland hevði verið á odda 11-8 í hálvleiksteðginum.

Toppskjútti hjá Finnlandi var Patrick Westerholm við átta málum. Bjørn Momberg skeyt sjey mál, Teddy Nordling gjørdi fimm mál og toppskjúttin móti Føroyum, Marcus Sjöstedt, gjørdi fýra mál. Toppskjútti hjá Belgia var ein leikari nevndur Sehovic, ið gjørdi átta mál. Finnland og Belgia møtast aftur sunnudagin í Finnlandi.

Finnland hevur sostatt fult stigatal eftir tríggjar teir fyrstu dystirnar. Liðið hevur sostatt lagt eitt gott støði, tá teir avgerandi dystirnar móti Ísrael skulu spælast.

Støðan í bólki 3

1. Finnland	3	3	0	0	84 : 55	29	6
2. Ísrael	2	2	0	0	57 : 42	15	4
3. Belgia	3	0	0	3	62 : 82	-20	0
4. Føroyar	2	0	0	2	35 : 59	-24	0

Hálvmarathon í Eysturoynni

Leygardagin 11. januar skipar Roysnið fyri tí árliga Nýggjárs hálvmarathon í Eysturoynni

RENNING
Tíðindaskriv

Leygardagin skipar rennifelagið Roysnið fyri hálvmarathon í Eysturoynni

Starturin er beint við eitt seyðahús á vegnum til Funningsfjørð. Seyðahúsið er á leið áraka vestara tunnilsmunna í Norðskálatunlinum. Málið er á keiini á Toftum.

Annars verður runnið eftir landsvegnum út til Skipanes, har sneitt verður oman á niðara veg. Síðan verður runnið út til Runavíkar, har sneitt verður oman á Fjøruveg við Sjómansheimið. Síðan verður runnið beina leið út á Tofta kei. Samlaði teinurin er eitt hálvmarathon, t.e. umleið 21,1 km.

Vatn verður at fáa á ávikavist 5 km, 10 km og 15 km. 5 km er í Skálabotni. 10 km er á Skipanesi. 15 km er nærhendis innastu húsunum á Glyvrum. 20 km er millum Saltnes og Toftir. Merki eru at finna á hesum støðum so til ber at halda eyga við tíðini.

Øll, ið eru 15 ár ella eldri (f. -1988), eru vælkomin at luttaka. Dentur verður lagdur á, at hetta fyrst og fremst er ein motiónskapping, ið kann hjálpa fólki at halda formin við líka um veturin. Annars verða heiðursmerki trimum teimum fyrstu í bólkunum: Kvinnur: (f. 1958-1988), menn (f. 1958-1988), kvinnur veteranar (f. -1957) og menn veteranar (f. -1957).

Tilmelding er á Tofta kei kl. 12.00. Luttøkugjaldið er 40 kr. Kl. 12.30 verður koyrt eftir rutuni inn til startin. Sjálv renningin byrjar kl. 13.00.

Til ber eisini at melda til við at senda teldupost til Roysnið roysnid@athletics.fo við upplýsing um navn, árgang og felag ella bygd. Luttøkugjaldið kann somuleiðis flytast á konto í Føroya Sparikassa (9181-415.704.6). Um hesin hátt ur verður nýttur ber til at møta við startin beint áðrenn kl. 13.00 leygardagin. Har verður startnummarið útflýggjað.

Tá komið er á mál verður okkurt gott at fáa á Toftum.

Nygaard fekk nei

FCK fer ikki at skriva sáttmála við Marc Nygaard. Hetta hevur FCK gjørt greitt, eftir at partarnir hava havt samband við hvønn annan seinastu dagarnar

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Nógvar gitingar og leysatíðindi eru at hoyra, nú FCK hevur givið Toda Jónsson eina tíðarfreist til mánadagin at taka eina avgerð, um hann ætlar sær at halda fram í felagnum, ella um hann fer at finna sær annað felag.

Orsøkin til at Todi hevur fingið hesa tíðarfreist er, at FCK so skal út á marknaðin sum skjótast at finna ein avloysara fyri Toda Jónsson.

Ein leikari, sum hevur verið inni í myndini, er Marc Nygaard, sum dagliga spælir við hollendska felagnum Roda. Men Niels Christian Holmstrøm hevur nú gjørt greitt, at FCK ikki fer at gera sáttmála við Nygaard, sum eisini hevur rótur í Føroyum.

Nygaard sigur við danskar fjølmiðlar, at hann er sera vónbrotin at hesum, tí hann hevði vónað at koma aftur til Keypmannahavnar at spæla fótbólt. Hann hevur fingið lítið av spælitíð í Hollandi, og hann hevði vónað, at eitt skifti gjørdist veruleiki.

Sostatt er tað greitt, at FCK ikki hevur nakran avloysara kláran handan leiktjaldið, men spennandi verður at síggja, hvørja avgerð Todi fer at taka í næstu viku. Venjingin er farin í gongd, og Todi verður í øllum førum í FCK hetta hálva árið.

Støðan í 1., 2. og 3. deild 8. jan 2003

1. deild

	Dystir	Stig	Eygur	Umfør	Medal
1 Klaksvíkar Klubbi	1	16	3876	180	21,53
2 Billardfelag Kaggin	1	12	3306	180	18,37
3 Tvøroyrar Billardfelag	1	10	2960	180	16,44
4 Havnar Klubbi	2	10	5570	360	15,47
5 Billardfelag Fuglafjardar	1	6	2808	180	15,60
6 Vágs Billardfelag	0	0	0	0	0

2. deild

	Dystir	Stig	Eygur	Umfør	Medal
1 Billardfelag Fuglafjardar	2	18	4218	360	11,72
2 Havnar Klubbi	2	17	3526	360	9,79
3 Billardfelag Kaggin	1	12	2170	180	12,06
4 Tvøroyrar Billardfelag	1	7	1364	180	7,58
5 Vágs Billardfelag 1	0	0	0	0	0
6 Vágs Billardfelag 2	0	0	0	0	0

3. deild

	Dystir	Stig	Eygur	Umfør	Medal
1 Billardfelag Kaggin	1	18	100	180	0,56
2 Vágs Billardfelag	1	16	1160	180	6,44
3 Tvøroyrar Billardfelag	1	2	776	180	4,31
4 Havnar Klubbi	1	0	100	180	0,56
5 Klaksvíkar Klubbi	0	0	0	0	0

Klaksvíkingar á odda í billarda

Klaksvíkar Klubbi er ikki serliga óvæntað á odda í 1. deild, men trý tey næstu liðini liggja sera jøvn

BILLARD
Tíðindaskriv

Ov fáir dystir eru spældir í billardkappingunum til at kunna siga nakað um, hvørji lið fara at kappast um oddasessirnar, tá avtornar. Hetta er galdandi fyri allar tríggjar deildir. Í 1. deild er støðan tann, at Klaksvíkar Klubbi, ikki serliga óvæntað, liggur á odda við 16 stigum, nr. 2. er Billardfelag Kaggans við 12 stigum, nr. 3 er Tvøroyrar Klubbi við 10 stigum. Havnar Klubbi er nr. 4 eisini við 10 stigum men hevur ein dyst meira enn hini liðini, nr. 5 er Billardfelag Fuglafjarðar við 6 stigum og aftast er Vágs Billardfelag, sum ongan dyst hevur spælt.

Klaksvíkingar løgdu sera hart út í sínum fyrsta dysti í kappingini móti Havnar Klubba. Teir vunnu 16-2. Norðoyarliðið var eisini mannað við best hugsandi manningini, sum hevur vunnið so gott sum alt, sum vinnast kann í føroyskum billard.

Bestur var Kristian Sune Høgnesen við 24,47 eygum í meðal og hann vann allar sínar dystir. Nr. 2 var Ólavur Kjølbro, tann nýggja stjørnan hjá Klaksvíkar Klubba, sum hevði umleið 19 eygu í meðal. Sonard Johannesen varð nr. 3 við góðum 21 eygum í meðal. Á Klubbaliðnum høvdu vit aftur hesaferð feðgarnar Nielsen. Niels Nielsen vann tann einasta dystin hjá Havnar Klubba. Hann hevði eitt meðal uppá umleið 18. Eirikur hevði 16 í meðal og Carsten Hansen umleið 14.

Hyggja vit nærri at teimum einstøku úrslitunum síggja vit, at talan er um byrjan av eini nýggjari kapping, tí eingir heilt stórir dystir vóru, nakað, sum vit annars hava sæð klaksvíkingar vartað upp við ferð eftir ferð í seinastu árini. Besti dysturin varð uppá 536 eygu. Og hann átti Kristian Sune. Hann hevði eisini besta umfarið uppá 104. Langt frá tí, sum hann annars plagar at vísa fram. Men lat okkum nú siggja, tá kappingin líður. Tað er rættiliga sannlíkt, at klaksvíkingar aftur í ár fara at vera í oddinum. Neyvan verða teir tiknir av øðrum liðnum, hvørki tvøramonnum ella Kagganum, hóast hann er styrktur við gomlum mimirsspælarum. Men enn kann so nógv henda.

Fleiri dystir verða í 1. deild hetta vikuskiftið. Kaggin spælir í Havnar Klubba, Klaksvíkingar spæla í Fuglafirði og tvøramenn spæla móti vágbingum.

2. deild

Í 2. deild er støðan tann, at fuglfirðingar eru á odda við 18 stigum, nr. er Havnar Klubbi við 17 stigum, nr. 3 er Kaggin við 12 stigum, nr. 4 er Tvøroyri við 7 stigum. Hvørki av liðunum, sum vágbingar manna, hevur spælt. Fuglfirðingar og Havnar Klubbi hava spælt tvey umfør, meðan Tvøroyri og Kaggin hava spælt eitt umfar. So eisini her er ómøguligt at siga nakað um, hvør fer at vera best fyri tá avtornar. Herfyri spældu Havnar Klubbi og Fuglafjørður. Fuglfirðingar vunnu 12-6.

Bestur í kappingini var Sofus Baldvinson, sum vann allar sínar dystir og hevði eitt meðal uppá nærum 20 eygu. Sofus er ein av teimum gomlu garvaðu billardspælarunum. Við honum á liðnum kunnu fuglfirðingar koma langt í 2. deild í ár. Jákup Gaard, sum eisini er ein av teimum gomlu veteranunum í billard í Fuglafirði gjørdist nr. 2 við umleið 13 eygum í meðal. Hann vann tveir dystir. Nr. 3 í kappingini var Jógvan Jørgensen á liðnum hjá Havnar Klubba við umleið 12 eygum ímeðal. Allir spælarar á Klubbaliðnum vunnu hvør sín dyst.

3. deild

Í 3. deild er støðan tann, at Kaggin er nr. 1 við 18 stigum.Vágbingar eru nr. 2 við 16 stigum, nr. 3 eru tvøramenn við 2 stigum, nr. 4 Havnar Klubbi við ongum stigi og somuleiðis klaksvíkingar við ongum stigi. Teir hava so ongan dyst spælt. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum, um so er, at dystir eru spældir men úrslitið ikki fráboðað kappingarleiðaranum.